LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Fylgiskjal 1

Ummælisskjal

Ummæli er komið frá Suðuroyar Sjúkrahúsi, Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, Føroya Kærustovni, Føroya Pro Vita, Mammuhjálpini, Megd, Fríum vali, Almanna- og mentamálaránum, Heilsumálaráðnum, Heilsutrygd og Gigni, Amnesty Føroyar, Sosialráðgevarafelag Føroya, Etiska ráðnum, Kvinnufelagnum í Havn, Javna, Javnstøðunevdini, Familjufyrisitingini og Landssjúkrahúsinum

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Umhvørvismálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið hava boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Fleiri av omanfyri nevndu pørtum hava viðmerkingar til somu greinar og evnir í uppskotinum. Heldur enn at viðgera ummælisskrivini hvør sær, verða viðmerkingarnar tí samlaðar undir undiryvirskriftir, har ásetingar og ávís evnir verða viðgjørd fyri seg.

Sum úrslit av hoyringini eru gjørdar nakrar broytingar í lógaruppskotinum.

Mest týðandi eru:

- Ein nágreining av, at fosturtøkuráðgeving er eitt tilboð og ikki eitt krav.
  § 1 er broytt soleiðis, at tað greitt framgongur, at talan er um eitt tilboð, og í ásetingini verður beinleiðis víst til § 7 um ráðgeving og § 10 um læknafrøðiliga kunning um inntrivið.

- Hvussu samráðið verður sett, og hvørjir fakbólkar manna samráðið.
  Í viðmerkingunum til § 14 verður nágreinað, at landsstýrisfólkið eigur at seta limirnar í samráðnum eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleikum, fakfeløgum o.ø. hetta fyri at tryggja, at samráðið er óheft. Í § 14 er nágreinað, at samráðið er mannað við einum løgfrøðingi, einum sosialráðgeva, einum sálarfrøðingi og tveimum læknum. Annar læknin er serlækni í kvinnusjúkum, meðan hin er serlækni í psykiatri.

- At avgerðir í samráðnum verða tiknar við vanligum meiriluta. Loyvi til fosturtøku verður sostatt ikki treytað av, at semja er um tað í samráðnum.

Harumframt eru nágreiningar gjørdar í viðmerkingunum, millum annað har ummælisskrivini vístu, at okkurt ikki var nóg greitt. Í hesum skjali eru serliga innihaldsligu viðmerkingarnar viðgjørdar, eins og flestu viðmerkingar, sum ikki eru tiknar til eftirtektar, eru umrøddar. Tøkniligar viðmerkingar eru tiknar til eftirtektar, og lógaruppskotið er tillagað samsvarandi, uttan at tað beinleiðis er tilskilað í hesum skjali.

Fyri at síggja ummælissvarini í fullum líki, verður víst til sjálv ummælissvarini, ið somuleiðis eru viðløgd sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

1. Viðmerkingar til ávísar greinar

1.1. Til § 1 *Fosturtøka áðrenn endan av 12. viku krevur ikki loyvi*

Frítt Val, Kvinnufelagið í Havn og Amnesty mæla til, at orðindin "við barn" í § 1 verður broytt til "upp á vegin", sum er eina meira neutrala orðing.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at orðingin upp á vegin er meira vanliga í talumáli heldur enn á skrift. Løgmálaráðið metir, at orðingin við barn hóskar seg betur í lógarteksti enn orðingin upp á vegin. Tí verður orðingin ikki broytt.

Amnesty hevur ikki viðmerkingar til markið fyri, nær fosturtøka er loyvi og ikki, men vísir á, at markið ikki má forða fyri, at kvinnan hevur atgongd til trygga og lógliga fosturtøku fyri at verja lív og heilsu alla viðgongutíðina. Ein kvinna skal kunna fáa eina fosturtøku so tíðliga sum møguligt og so seint sum neyðugt.

Mammuhjálpin vísir á, at eingin grundgeving er fyri, hví markið fyri fosturtøku uttan loyvi verður 12 vikur, og **Etiska ráðið** vísir á, at tað er trupult at síggja, hví markið fyri fosturtøku uttan loyvi er sett til 12 vikur, og at tað kundi verið grundgivið betur fyri, hví markið er sett til júst 12 vikur.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tá tað ræður um spurningin um fosturtøku eru fleiri atlit, sum skulu takast. Tað er atlitið at kvinnuna og hennara rætti til sjálv at taka avgerðir um og ráða yvir egnum kroppi, atlitið at fostrinum, atlitið at manninum og atlitið at heilsustarvsfólkum, sum skulu fremja fosturtøkuna.

Løgmálaráðið ásanna, at tað er torført at taka atlit at øllum pørtum í einum lógaruppskoti um fosturtøku.

Í hesum uppskotinum er valt, at atlitið at kvinnuni má viga tyngst og ganga framum hini, tí tað er hon, sum gongur við barninum og hennara viðurskifti, sum beinleiðis verða ávirkaði. Í øðrum lagi er atlitið at barninum raðfest á tann hátt, at fosturtøka eigur at vera framd so tíðliga sum til ber í viðgongutíðini, og at tað eru strangar treytir fyri at fáa fosturtøku eftir 12. viku, sum krevur loyvi frá einum samráði. Hildið verður fast um hetta.

Sambært uppskotinum kann ein kvinna fáa fosturtøku uttan loyvi, hóast freistin upp á 12 vikur er farin. Tað er í førum, har lív og heilsa kvinnunnar er í vanda, ella um inntrivið er neyðugt fyri at forða fyri, at likamliga og sálarliga heilsan hjá kvinnuni viknar munandi, og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður.

Heilsutrygd og Gigni, MEGD og Frítt Val vísir á, at ymiskar orðingar verða brúktar um kunningina og vegleiðingina til kvinnuna í § 1 og um ráðgeving og stuðulssamrøðu í § 7. Tí verður mett, at tað er ógreitt, hvør partur av hesum er kravd vegleiðing, og hvat er eitt tilboð. Mælt verður somuleiðis til at víst verður til § 10 um læknafrøðiliga kunning og vegleiðing.

Løgmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar. Verandi orðing í § 1 kann ljóðar sum eitt krav og ikki sum, at kvinnan skal hava tilboð um kunning. Orðingini í § 1 verður tí broytt soleiðis, at tað tað framgongur, at kvinnan skal hava í boðið kunning og vegleiðing sambært § 7.

Frítt Val og Amnesty mæla til, at kvinnur, sum eru í Føroyum í longri tíð, hóast tær ikki hava fastan bústað í Føroyum, hava sama rætt til fosturtøku sambært § 1, sum kvinnur, sum búgva í Føroyum. Víst verður m.a. á, at hetta stuðlar undir, at fosturtøkur verða framdar so skjótt sum gjørligt, eins og tryggjað verður, at føroyingar, sum búgva uttanlands í lestrarørindum, hava rætt til fosturtøku í Føroyum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at ásetingin er í samsvari við løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, har tað m.a. í § 5 er ásett, at persónar, ið búgva her í landinum, hava rætt til ókeypis viðgerð frá sjúkrahúsverkinum. Víðari er í § 6 ásett, at persónar, ið ikki búgva her í landinum, hava rætt til ókeypis viðgerð v.m. frá sjúkrahúsverkinum í sambandi við vanlukku, brádligan sjúkutilburð v.m., ella um varandi sjúka brádliga versnar. Hjálpin verður tá veitt við somu treytum, sum verða settar persónum, ið búgva her í landinum. Tað er landsstýrisfólkið í heilsumálum, sum kann áseta reglur um, at ávísir persónsbólkar, ið ikki búgva her í landinum, fáa rætt til ta í § 5, stk. 1 umrøddu veiting beinanvegin.

1.2. Til § 3 *Loyvi til fosturtøka eftir 12. viku.*

Frítt Val og Amnesty taka ikki undir við, at samráðið kann krevja, at revsimál eru meldað til løgregluna í neyðtøkumálum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað kann viðvirkar til at fløkja og seinka málsviðgerðina, um málið skal meldast til løgregluna, og vandi kann tí vera fyri, at inntrivið ikki verður framt so tíðliga í viðgongutíðini sum gjørligt. Tað verður tí ikki ein treyt, at málið skal meldast. Tó verður sett sum treyt, at samráðið skal tryggja sær, at málið verður væl upplýst, og at talan eftir øllum líkindum veruliga er um brot á § 210 og §§ 216-224 í revsilógini.

Heilsutrygd og Gigni vísa á, at tað í viðmerkingunum til § 3, nr. 3, sum snýr seg um vandan fyri, at barnið fær álvarsliga sjúku, kundi verið greitt nærri frá hesum við dømum um sjúkur, og hvussu slík viðurskifti verða staðfest og viðgjørd. Heilsutryg og Gigni spyrja, hvørji alternativ verða hugsað um, og hvørjir instansir ella tilboð kunnu aktiverast fyri at arbeiða við alternativum, um viðgongutíðin ella umsorganin er ein byrða, sum ikki slepst undan á annan hátt enn við fosturtøku, sum nevnt í § 3, nr. 5, og um tað kann tilskilast í lógini, hvussu tørvurin hjá kvinnuni skal útgreinast, soleiðis at ein neyðug hjálp verður ítøkilig og veruliga kann setast í verk.

Somuleiðis verður víst á, at ímeðan tað ikki er so trupult at ímynda sær støður, sum kunnu føra til undantøk eftir nr. 1-4, so er tað ikki so við 5. Hvørjir upplýsingar ella viðurskifti kunnu vera, sum ikki vóru greið áðrenn 12. viku, sum kunnu geva orsøk til eina fosturtøku og tí undantak til 12-viku markið.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at talan altíð er um eina ítøkiliga meting av vandanum fyri, um barnið fær eina álvarsliga sjúku. Samráðið ger eina meting út frá upplýsingum um støðu og útlit hjá fostrinum, viðgerðarmøguleikum, váðan við skurðviðgerðum, væntað tal á skurðviðgerðum, vandi fyri eftirsjúku umframt møguleikunum hjá barninum at fáa vanligt virkisføri. Ásetingin fevnir sostatt eisini um álvarslig avskap. Aktuellu viðgerðarmøguleikarnar hava eisini týdning í hesum sambandi, og tí er læknafrøðiliga menningin og tøki serkunnleikin eisini við til at staðfesta, nær loyvi kann gevast og ikki. Tí ber ikki til at nevna ávísar sjúkur. Tó verður skoytt upp í viðmerkingarnar til ásetingina, at talan er um eina ítøkiliga og læknafakliga meting, sum verður gjørd út frá støðuni hjá einstaka fostrinum og ikki út frá samfelagsligum atlitum.

Løgmálaráðið skal vísa á, at sambært uppskotinum skal tann læknin, sum fær eina umsókn um fosturtøku, upplýsa kvinnuna um møguleikan fyri ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 7. Ráðgevingin er mannað við fakfólki, og eitt av endamálunum við ráðgevingini er at kunna kvinnuna um møguleikar fyri at fáa hjálp og stuðul, so sum fíggjarligan, sosialan og sálarfrøðiligan stuðul, undir hesum, hvørji tiltøk kunnu setast í verk, um hon velur at eiga barnið. Í viðmerkingunum verður eitt nú víst til MEGD og Almannaverkið. Mett verður, at hesi hava vita um tey tilboð, sum eru tøk.

Ásetingin í § 3, nr. 5 snýr seg um loyvi til fosturtøku orsakað av sosialum umstøðum. Í viðmerkingunum verður eitt nú víst á atliti at øðrum børnum í familjuni, og at tey fáa eina fullgóða uppaling, fíggjarlig viðurskifti og álvarslig sjúka ella avlamni hjá einum í familjuni. Hetta eru støður, sum ikki neyðturviliga vóru til staðar, áðrenn kvinnan er komin 12 vikur, men sum kunnu íkoma eftir 12. viku í viðgongutíðini. Tá krevur fosturtøka loyvi frá samráðnum.

Heilsutrygd og Gigni vísa á, at orðingin *"... ella av lívsviðurskiftum hennara í aðramáta"* í § 3, nr. 1 er óítøkilig, og viðmerkingarnar greiða ikki so væl frá, hvussu hetta skal skiljast. Tí kann hetta lesast sum ein "ventilur", sum kann nýtast at loyva fosturtøku eftir 12. viku, har treytirnar annars ikki eru lokna.

Løgmálaráðið skal vísa á, at avgerðandi treytin fyri at fáa fosturtøku eftir § 3, nr. 1 er, um vandi er fyri at heilsan hjá kvinnuni viknar. Orðingin *"ella av lívsviðurskiftum hennara í aðramáta"* er sostatt ikki ein ventilur, men eitt dømi um orsøkir, sum kunnu liggja til grund fyri, at vandi er fyri, at heilsan hjá kvinnuni viknar. Í viðmerkingunum til ásetingin stendur, at tað ikki er ein og hvør vandi fyri heilsuni, sum kann grunda loyvi til eina fosturtøku. Avgerðin má takast við støði í einari ítøkiligari meting um, hvønn vanda talan er um, samanhildið við, hvussu stórur vandin er fyri, at heilsan hjá kvinnuni viknar.

Til § 3, nr. 4 og 5 vísir **Javni** á, at um ein kvinna ikki megnar eina íkomna støðu, kann rættiliga lætt tengjast at tí hjálp, ið kvinnan, familjan ella barnið fær bjóða. Útlit til manglandi møguleikar fyri hjálp, um barnið væntast at bera brek, má ongantíð verða orsøkin til, at ein kvinna velur fosturtøku. Víst verður á týdningin av, at kvinnan fær neyva kunning um, hvør hjálp er at fáa eftir barnsburð um útlit eru fyri, at barnið ber brek.

Løgmálaráðið skal vísa á, at tað kunnu vera nógvar og ymiskar orsøkir til, at ein kvinna umhugsar fosturtøku. Dentur verður lagdur á at tryggja, at allar kvinnur fáa í boði ráðgeving og vegleiðing frá fakfólki. Um staðfest verður, at vandi er fyri, at fostrið er álvarsliga sjúkt ella er hevur álvarslig avskap, hevur læknin, sum fær eina umsókn um fosturtøku skyldu til at kunna kvinnuna um møguleikarnar fyri at fáa meira kunning og ráðgeving frá viðkomandi felagsskapum og serlæknum. Somuleiðis er dentur lagdur á týdningin av, at aðrar sosialar skipanir virka til fulnar, soleiðis at ein kvinna heldur enn fosturtøku kann velja at eiga barnið.

Etiska ráðið spyr, um tað er rætt at loyva fosturtøku av sosialum ávum. Víst verður á, at loysnin í slíkum førum heldur kundi verið at betra um almennar skipanir, tryggja atgongd til góðan búskap, veita sálarligan stuðul og so framvegis. Víst verður m.a. á, at um arbeitt verður fyri, at sosialar skipanir og tænastur verða so góðar, at fosturtøka av sosialum ávum ikki gerst neyðug, so verða loyvi til fosturtøkur ikki givnar av teirri orsøk longur, málið er rokkið. Hinvegin kann ein eisini siga sum so, at tað, at lívið hjá mammuni gerst meira avbjóðandi, er ikki ein nóg góð orsøk til, at ein loyvir fosturtøku – serliga ikki um tað almenna veitir ta hjálp, tað kann. Somuleiðis verður víst á, at viðmerkingarnar til ásetingina eru ógreiðar og vandi er fyri, at ásetingin verður tulkað breiðari enn helst ætlað.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at eitt av aðalmálunum við uppskotinum er, at eingin kvinna skal fáa fosturtøku orsakað av fíggjarligum ella sosialum umstøðum. Tí verður dentur í uppskotinum lagdur á bæði at vísa á aðrar skipanir og tørvin á, at hesar skipanir virka til fulnar, eins og dentur verður lagdur á, at kvinnan kann fáa vegleiðing og ráðgeving frá fakfólki, soleiðis at hon fær nøktandi kunning um teir møguleikar hon hevur fyri at fáa ta hjálp, henni tørvar. Mett verður, at tørvur er á eini áseting, sum heimilar fosturtøku orsakað av sosialum umstøðum. Hetta krevur tó serstakt loyvi frá samráðnum. Hetta eisini tí, at tað er nógv sum bendir á, at tað í Føroyum ikki eru tær heilt ungu kvinnurnar, sum fáa fosturtøku, men heldur kvinnur, sum hava familju og longu hava fingið børn. Tað verður beinleiðis nevnt í ásetingini sum ein treyt fyri at fáa loyvi til fosturtøku, at kvinnan kann ikki sleppa undan byrðuni á annan hátt. Í tann mun almenn tilboð eru, sum kunnu bøta um viðurskiftini og lætta munandi um byrðuna, talar hetta ímóti at geva loyvi til fosturtøku. Her verður eitt nú hugsað um sosialan, fíggjarligan og persónligan stuðul.

Pro Vita vísir á, at sambært uppskotinum kann kvinnan velja fosturtøku fram til viku 12, og eftir viku 12 er einki mark uppeftir, um grundgivið verður fyri fosturtøkuni við omanfyri nevndu grundgevingunum. Sjálvt tá barnið er lívført, kann loyvi vera givið til fosturtøku, um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarslig sálarlig ella likamlig brek ella sjúku.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at loyvi sum meginregla ikki kann gevast til fosturtøku, um fostrið er lívført. Sostatt verður eitt evsta mark sett fyri, nær fosturtøka kann verða framd. Er fostrið lívført, kann loyvi til fosturtøku sambært uppskotinum bara verða givið, um fostrið er so álvarsliga sjúkt, at avgerandi grundir tala fyri ikki at noyða kvinnuna at ganga viðgongutíðina út.

Javni og Sosialráðgevarafelagið spyrja, hvør ella hvat skal avgerða, nær vandin sambært § 3, nr. 3 fyri, at barnið ber brek, er stórur, og hvat eitt álvarsligt brek er. Eisini verður spurt, fyri hvønn brekið ella sjúkan skal vera álvarslig, og um ein listi skal vera yvir brek, ið verða mett álvarslig.

Pro Vita metir at uppskotið eggjar til eitt mál ella ideali fyri samfelagið um, at øll, skulu verða fødd uttan brek, uttan arvaligar sjúkur, uttan sálarsjúku, og at fólk ikki skulu vera fátæk, tá fosturtøka er tann hjálpin, mann vil bjóða fólki. Víst verður á, at høvuðsgrundgevingarnar fyri at fáa fosturtøku eru brek, fíggjarviðurskifti og sosial viðurskifti. Somuleiðis fær kvinnan eina samfelagsliga ábyrgd til at skula hugsa um samfelagið, um hon t.d. velur eitt barn til, sum ber brek. Fosturtøka skal ikki vera í handkeyp, men eitt inntriv, sum verður gjørt við læknafakligari ráðgeving til, sum av heilsuávum fáa tað bjóðað, eins og vit fáa aðrar viðgerðir bjóðaðar og kunnu takka nei.

Megd tekur ikki undir við § 3, nr. 3 og 4, har ásett er, at fosturtøka kann verða framd um vandi er fyri, at barnið ber álvarslig brek ella hevur álvarsliga sjúku, og um kvinnan orsakað av sjúku ella menningartarni ikki megnar at hava umsorgan fyri barninum. Víst verður m.a. á, at vandin fyri at fremja mismun vegna brek er sera umfatandi og fleiri grundleggjandi avbjóðingar standast í hesum førum, m.a. at orðingarnar mana fram ein hugburð ella ta mentan, at eitt lív við breki er minni vert at liva, og at fólk við breki eru í minni mun menniskju enn onnur, ið ikki bera brek. Víst verður í hesum sambandi á tilmælir frá altjóða brekrættindanevndini. MEGD tekur ikki undir við, at uppskotið ikki hevur avleiðingar fyri nakrar ávísar samfelagsbólkar.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at sambært uppskotinum kann fosturtøka verða framd eftir 12. viku, um nærri ásettar treytir eru loknar, herundir m.a. um vandi er fyri, at barnið fær álvarsliga

sjúku. Orðingin í § 3, nr. 3 er broytt soleiðis, at orðið brek er strikað úr lógartekstinum. Ætlanin við uppskotinum er ikki at gera mismun vegna brek. Ásetingarnar í § 3 eru undantaksreglur, og fosturtøka eftir 12 viku krevur serstakt loyvi. Tað er samráðið, sum er mannað við viðkomandi fakbólkum, sum tekur avgerðina. Ásett verður, at talan skal vera um álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku, undir hesum álvarslig avskap. Sambært viðmerkingunum til uppskotið eru viðurskifti, sum ikki eru ein vandi fyri virkisførið hjá fostrinum seinni í lívinum, sum meginregla ikki grundarlag fyri at gera loyvi til fosturtøku. Somuleiðis er dentur lagdur á at veita kvinnum ráðgeving og vegleiðing, soleiðis at ein kvinna heldur enn fosturtøku kann velja at eiga barnið. Løgmálaráðið metir tí ikki, at uppskotið áleggur kvinnuni eina samfelagsliga ábyrgd til at skula hugsa um samfelagið, um hon velur eitt barn til, sum er álvarsliga sjúkt, hevur álvarslig avskap ella ber brek. Í viðmerkingarnar til ásetingina verður skoytt upp í, at tað altíð er ein ítøkilig og læknalig meting út frá støðuni hjá einstaka fostrinum og ikki út frá t.d. samfelagsligum atlitum annars.

Løgmálaráðið skal somuleiðis viðmerkja, at avgerandi fyri, um fosturtøka kann vera framd sambært § 3, nr. 4 er, um kvinnan megnar at hava umsorgan fyri barninum ella ikki. Loyvi kann sostatt ikki verða givið til fosturtøku einans við tí grundgeving, at kvinnan ber brek.

1.3. Til § 5 *Um fostrið er lívført*

MEGD mælir til, at § 5 verður strikað, av tí at rætturin hjá fostrinum til lív verður avmarkaður beinleiðis orsakað av brekinum. Hetta tykist greitt at stríða ímóti altjóða brekrættindasáttmálum, við tað at talan er um beinleiðis mismun vegna brek. Í teimum heilt sjáldsomu førum, har barnið eitt nú ikki hevur lív lagað ella hevur stutt lív lagað í stórari pínu, og hetta er orsakað av einum breki, eigur undantak at vera givið, soleiðis at fosturtøka verður loyvd.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at orðingin í § 3, nr. 3, sum víst verður til í § 5, er broytt, soleiðis at orðið brek ikki framgongur. Ætlanin við uppskotinum er ikki at gera mismun vegna brek. Ásetingin í § 3, nr. 3, loyvir fosturtøku í førum, har barnið hevur álvarsliga sjúku ella avskap, sum eitt nú verður mett um út frá støðu og útlitum hjá fostrinum o.ø.

§ 5 er ein undantaksregla, sum er ætlað í teimum førum, har barnið er so álvarsliga sjúkt ella hevur so álvarslig avskap, at avgerandi grundir tala fyri ikki at noyða kvinnuna at ganga viðgongutíðina út. Loyvi kann sum meginregla ikki gevast til fosturtøku, um fostrið er lívført. Sostatt verður eitt evsta mark sett fyri, nær fosturtøka kann verða framd.

1.4. Til § 7 *Stuðulssamrøða fyri og eftir inntrivið.*

Pro Vita metir, at fosturtøkuráðgevin eigur at vera kravd, soleiðis at allar kvinnur hava javnbjóðis rætt til kunning og vegleiðing, soleiðis sum tað eitt nú er í týsku fosturtøkulógini. Hendan ráðgeving vekur javnvág millum kvinnurættindi og sjálvræði og ein samfelagsligan áhuga í at verja lívið hjá tí ófødda barninum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at ein lækni, sum fær eina umsókn um fosturtøku, hevur skyldu til at kunna og vegleiða kvinnuna um møguleikan fyri at fáa ráðgeving og stuðulssamrøðu. Løgmálaráðið metir tí, at allar kvinnur sambært uppskotinum hava javnbjóðis rætt til kunning og vegleiðing. Viðmerkingin verður tí ikki tikin til eftirtektar.

Heilsutryg og Gigni vísa á týdning av ráðgevingin og vegleiðingin. Støður og umstøður kunnu broytast, og tí skal kvinnan latast í til at taka støðu bæði út frá núverandi støðu og møguligari framtíðarstøðu og -avleiðingum.

Frítt Val og Amnesty mæla til, at serlæknar í kvinnusjúkum ella ein bólkur av viðkomandi starvsfólki fáa til uppgávu at definera, hvørja kunning kvinnan skal fáa, og at kommunulæknin einans hevur til uppgávu at kunna kvinnuna um møguleikan fyri ráðgevin.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at landsstýrisfólki ásetir nærri reglur um ráðgevingina í kunngerð ella leiðbeining, har tryggjað verður, at allar kvinnur fáa nøktandi og somu vegleiðing. Uppskot um kunngerð verður sent til ummælis hjá viðkomandi pørtum, sum hava tíðandi vitan um, hvat ein slík ráðgeving eigur at innihalda.

Javnstøðunevndin leggur áherðslu á, at ráðgevingin ikki eigur at verða tvingað kvinnum, ið ikki ynskja hana.

Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar vísir m.a. á, at tað er viðkomandi at hugsa ein sálarfrøðing inn í tilboðið um ráðgeving og stuðulssamrøðu. Hetta tí at fáir fakbólkar eru betri skikkaðir til at veita slíkar stuðulssamrøður, hvat fyrimunir og vansar við slíkari avgerð viðvíkur – og hvørjar avleiðingar avgerðin kann fáa, óansæð um avgerðin verður tikin um at fullføra barnsburðin ella bróta hann av.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at ráðgevingin stendur kvinnuni í boði. Sambært uppskotinum eru sálarfrøðingur og aðrir viðkomandi fakbólkar partur av ráðgevingini. Eins og í dag ber til at fáa ókeypis ráðgeving frá sálarfrøðingi, løgfrøðingi, sosialráðgeva ella øðrum viðkomandi fakkunnleika.

Mammuhjálpin fegnast um at kvinnan kann fáa ráðgeving og stuðul, men stúrir samstundis fyri, at ráðgevingin og stuðulin til kvinnur, ið umhugsa fosturtøku, fer at verða manglandi, tí vandi er fyri, at tær verða sendar skjótari víðari í skipanini.

Løgmálaráðið skal viðmerkja í uppskotinum er víst á tiltøk, sum kunnu verða sett í verk, soleiðis at ein kvinna heldur enn at velja fosturtøku kann velja at eiga barnið. Somuleiðis er dentur lagdur á, at ein kvinna, sum umhugsar fosturtøku, fær góða ráðgeving og stuðulssamrøðu, har hon frá fakfólki kann fáa upplýsing um møguleikarnar fyri at søkja um sosialan, fíggjarligan og persónligan stuðul bæði til at fullføra viðgongutíðina og um stuðul eftir, at barnið er føtt. Læknin, sum fær eina umsókn um fosturtøku, hevur skyldu til at upplýsa um hendan møguleikan.

1.5. Til § 8 *Umsókn. Kvinna søkir sjálv.*

Frítt Val, Kvinnufelagið í Havn og Amnesty mælir til, at orðið "umsókn" í § 8 verður broytt til "áheitan" ella "umbøn". Hetta tí at orðið umsókn kann sipa til, at inntrivið krevur góðkenning ella loyvi. Víst verður eisini á, at tað ikki eigur at vera krav, at kvinnan upplýsir, hví hon ynskir fosturtøku. **Amnesty** vísir á, at umsókn ikki skal sendast í samband við aðrar heilsuviðgerðir, men t.d. ein ávísing ella at eitt skjal skal fyllast út. Mæla verður frá at gera mun á mannagongdum í fosturtøkuviðgerð og øðrum viðgerðum í heilsuverkinum. Amnesty Føroyar undrast á, hvør orsøkin til tað at læknin skal spyrja, hvør orsøkin til ynskið um fosturtøku er.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at mannagongdin fyri at fáa fosturtøku er, at kvinnan bæði fyri og eftir 12. viku í fyrstu atløgu vendir sær til kommunulækna fyri har at fáa eina ávísing til fosturtøku. Tí verður ikki mett neyðugt at broyta orðið "umsókn".

Heilsutrygd og Gigni vísir á týdningin av, at sjálvt um ein umsókn verður talgild, eigur ein møgulig umsókn altíð at fara til ein kommunulækna, sum so skal tryggja sær, at treytirnar um vegleiðing í § 1 og § 7 eru loknar.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um umsókn um fosturtøku og um viðger av málum um fosturtøku. Hædd verður tikin fyri hesum í hesum sambandi.

1.6. Til § 9 *Aldursmark og samtykki*

Sosialráðgevarafelag Føroya, Frítt Val, Kvinnufelagið í Havn, Amnesty Føroyar og Etiska ráðið vísa á, at kynsligi lógaldurin er 15 ár, at 15 ára gomul hava rætt til viðgerð uttan samtykki og kunnu taka aðrar reprodukativar avgerðir og at tey kunnu revsast. Víst verður á, at ung millum 15-18 ár hava rætt til partvíst samtykki. T.d. ber ikki til at vísa børn til kanningar, útgreiningar ella viðgerð annars, um tann ungi ikki vil tað, eins og barnaverndartænastu ikki kunnu seta tiltøk í verk uttan samtykki frá ungum, ið eru vorðin 15 ár. Víst verður eisini til siðvenju í Danmark, har tann unga kvinnan millum 15-18 ár hevur rætt til at taka avgerðina, men at foreldrini eisini hava rætt til at kunnast um hesa. **Frítt Val, Kvinnufelagið í Havn, Amnesty** mæla til, at aldursmarkið verður broytt til 15 ár. Um hildið verður fast um aldursmarkið á 18 ár, mælir **Amnesty** til, at kvinnan eigur at verða eggjað til og vegleidd um at tosa við foreldur ella verja um støðuna, og at læknin hevur skyldu til at bjóða kvinnuni hjálp. **Etiska ráðið** vísir á, at kravið um samtykki frá foreldrum eigur at vera viðgjørt meira kritiskt.

Heilsumálaráðið vísir á, at 15 til og við 17 ára gomul sambært § 17, stk. 1 í føroysku sundheitslógini sum meginregla sjálvi kunnu geva samtykki til viðgerð, men at foreldramyndugleikin sum meginregla skal kunnast og inndragast í støðutakanina hjá tí unga. Í hesum føri er talan um eitt uppskot til serlóg á økinum, og Heilsumálaráðið metir tískil, at ásetingarnar í Fosturtøkulógini koma at vera galdandi framum ásetingarnar í føroysku Sundhedslógini. Ein møguleiki er eisini, at skriva hetta inn í serligu viðmerkingarnar til grein 9.

Løgmálaráðið skal vísa á almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið. Tað er ein stór og trupul avgerð at taka, hvørt ein fosturtøka skal fremjast ella ikki. Talan er um eina so týðandi avgerð, sum kann fáa avleiðingar seinni í lívinum. Eitt krav um, at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleika skulu geva samtykki til eina fosturtøku, er við til at skapa eina stuðlandi og vegleiðandi rammu um gentuna ella ta ungu kvinnuna og møguliga lætta um avgerðartilgongdina. Hetta er eisini við til at tryggja og verja vælveruna hjá gentuni ella tí ungu kvinnuni.

Tí verður hildið fast um meginregluna um, at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, skulu geva samtykki til eina fosturtøku, um gentan ella kvinnan er undir 18 ár.

Løgmálaráðið tekur viðmerkingarnar frá Heilsumálaráðnum til eftirtektar og skoytir upp í viðmerkingarnar til § 9, at ásetingarnar í uppskotinum vera galdandi framum ásetingarnar í sundheitslógini.

Javnstøðunevndin mælt til, at karmarnir fyri, nær loyvi kann gevast til, at kvinnur undir 18 ár fáa fosturtøku uttan at innheinta samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, verða víðari og geva møguleika fyri at meta um aðrar ítøkiligar støður, ið ikki eru positivt nevndar í serligu viðmerkingunum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at viðmerkingunum til ásetingina eru støður sum harðskapur, sosialar avleiðingar og neyðtøka ella blóðskemd eru nevnd sum dømir. Eisini er nevnt, at tað ikki er nokk, um kvinnan er bangin fyri, at foreldrini fáa vitan um, at hon er kynsliga aktiv. Løgmálaráðið leggur afturat í viðmerkingunum til uppskotið, at talan ikki er um eina úttømandi uppreksan av, nær loyvi kann vera givið til fosturtøku og ikki uttan samtykki, og at talan altíð er um eina ítøkiliga meting.

Frítt Val og Kvinnufelagið í Havn vísa á, at munur ikki eigur at vera gjørdu á, um kvinnan er gift ella ikki. Frítt val vísir somuleiðis á, at tað eigur at verða lógartryggjað, at foreldramyndugleikahavin ella makin, ikki kunna taka avgerð um, at kvinna undir 18 ár skal fullføra eina viðgongutíð, um hon ikki ynskir tað.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at børn og ung undir 18 ár eru ómyndug og undir foreldramyndugleika. Hetta er tó ikki galdandi, um tey eru gift. Tí er hesin mundu nevndur í § 9.

1.7. Til § 12 *Meirkunning tá ið barnið er álvarsliga sjúkt í móðurlívi*

Sosialráðgevarafelag Føroya metir, at at ein sosialráðgevi á Almannaverkinum er eins væl egnaður at vegleiða kvinnum um stuðulsmøguleikar til foreldur, ið hava børn við serligum tørvi.

Løgmálaráðið tekur hetta til eftirtektar, soleiðis at tað í § 12 verður skoytt upp í, at víst kann eisini verða til myndugleikar fyri at fáa meira kunning og ráðgeving. Viðmerkingarnar til ásetingina verða nágreinaðar samsvarandi.

Etiska ráðið og Megd vísa á, at teir felagsskapir, sum víst verður til at veita meira kunning, um vandi er fyri, at barnið ber álvarslig brek ella fær álvarsliga sjúku, ikki hava lønt starvsfólk. Tí kann tað vera meira tilvildarligt, hvør er forfólk, og hvørt hesi hava royndir í at veita slíka ráðgeving. Víst verður á, at treytin um, at MEGD og limafeløgini skulu veita meira kunning um fosturtøku, um staðfest verður, at barnið m.a. ber brek, er órímilig. Hetta m.a. orsakað av avmarkaðari fíggjarligari orku, at neyðugt er at umrøða ítøkiliga ábyrgdarbýtið, eyka fígging, og hvussu slík ráðgeving kann staðfestast í skriftligari avtalu millum viðkomandi partar.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað í § 12 er ásett, at um umsóknin um fosturtøku er grundað á, at barnið er álvarsliga sjúkt, skal læknin kunna kvinnuna um møguleikarnar fyri at fáa meira kunning og ráðgeving hjá viðkomandi myndugleikum, felagsskapum og serlæknum. Í serligu viðmerkingunum til ásetingina verður víst á MEGD sum ein møguleika, eins og víst verður til eitt møguligt Brekumboð. Tað verður sostatt ikki álagt MEGD nakra skyldu í hesum sambandi. Havandi í huga, at MEGD og eitt møguligt Brekumboð hava serliga stóra vitan um rættindi hjá fólki, sum t.d. bera brek, verður tí mett, at víst eigur at vera til MEGD í hesum sambandi.

1.8. Til § 14 og 15 *Samráðið*

Frítt val, Kvinnufelagið í Havn, Javnstøðunevndin, Amnesty Føroyar, MEGD og Etiska ráðið vísa á týdningin av, at samráðið er politiskt óheft og mælir tí til, at Heilsustýrið ella Heilsutrygd seta samráðið fyri at trygga, at tað ikki verður óvirkað av, hvørjir flokkar sita í

stjórn. Víst verður somuleiðis á, at tað ikki er nóg greitt, við hvørjum fakbólkum samráðið er mannað og hvussu tryggjað verður, at ymisku fakbólkarnir eru umboðaðir.

Sosialráðgevarafelag Føroya vísir á, at tað er umráðandi, at ein í samráðnum hevur eina sosiala útbúgving.

Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar mælir til, at ein sálarfrøðingur er í samráðnu.

MEGD vísir á týdningin av, at samráðið hevur eitt umboð, ið hevur serligt innlit í viðurskifti hjá fólki, ið bera brek.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað vanliga er landsstýrisfólkið, sum setir nevndir og ráð. Løgmálaráðið tekur undir við, at samráðið eigur at vera politiskt óheft. Løgmálaráðið hevur vent sær til Heilsumálaráðið við fyrispurningi um, hvør samráðið kundi verið sett av Heilsustýrinum ella Heilsutrygd. Heilsumálaráðið metti ikki, at Fólkaheilsustýrið ella Heilsutrygd eru rætti myndugleiki at seta samráðið. Løgmálaráðið tekur hetta til eftirtektar.

Uppskotið verður tó broytt soleiðis, at tað í viðmerkingunum til § 14 verður nágreinað, at landsstýrisfólkið eigu at tryggja, at samráðið er politiskt og í aðrar mátar óheft. Hetta kann verða gjørt við, at landsstýrisfólkið setir limirnar í samráðnum eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleikum og avvarandi fakfeløgum.

Ítøkiliga merkir hetta, at løgfrøðingurin kann verða settur eftir tilmæli frá Løgmálaráðnum, sosialráðgevin kann verða settur eftir tilmæli frá Sosialráðgevarafelag Føroya, sálarfrøðingurin kann verða settur eftir tilmæli frá Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, og læknarnir kunnu verða settir eftir tilmæli frá Heilsumálaráðnum.

Løgmálaráðið tekur somuleiðis undir við, at tað greitt eigur at framganga, hvørjir fakbólkar manna samráðið. Uppskotið verður tí broytt soleiðis, at samráðið er mannað við einum løgfrøðingi, einum sosialráðgeva, einum sálarfrøðingi og tveimum læknum, har annar er serlækni í kvinnusjúkum og hin er serlækni í psykiatri.

1.9. Til § 15 *Semja krevst til loyvi*

Frítt Val og Amnesty mælt til, at vanligur meiriluti er galdandi, tá ið avgerð verður tikin í samráðnum.

Løgmálaráðið tekur undir við hesum og broytir uppskotið samsvarandi.

1.10. Til § 16

Føroya Kærustovnur vísir á, at soleiðis sum § 16 og serligu viðmerkingarnar til § 16 eru orðaðar, er tað í høvuðsheitum løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, sum er stýrandi fyri sjálva málgongdina hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum. Hetta er m.a. galdandi í mun til viðurskiftini viðvíkjandi avgerð hjá Føroya Kærustovni í §§ 6-8 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn og eisini í sambandi við setan av Føroya Kærustovni í § 5 í løgtingslóg um Føroya Kærustovn – tó havandi í huga serligu ásetingarnar í uppskotinum til løgtingslóg um fosturtøku um nýtslu av serkønum hjá Føroya Kærustovni.

Føroya Kærustovnur vísir á stóra týdningin av, at full greiða er um, hvussu málsgongdir skulu vera. Hetta ger seg serliga galdandi, tá talan er um viðkvom mál, sum skulu viðgerast í skundi. Tískil metir Føroya Kærustovnur tað vera skilagott, at tað í uppskotinum til løgtinglóg um fosturtøku verður víst til løgtingslóg um Føroya Kærustovn í mun til grundleggjandi viðurksiftini í sambandi við málsgongdina hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum.

Løgmálaráðið tekur viðmerkingarnar frá Føroya Kærustovni til eftirtektar. Tí er sum stk. 4 í § 16 ásett, at fyri málsgongdina í Føroya Kærustovni er løgtingslóg um Føroya Kærustovn galdandi.

Etiska ráðið vísir á trupulleikan av at hava ein serlækna í kvinnusjúku at viðgera kærumál, tá ið mann er varugur við, at tað kann vera ein avbjóðing.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað er serlæknin í kvinnusjúku, sum verður mettur at vera best skikkaður og hevur servitan um reproduktiva heilsu, herundir sum heild um tað at vera við barn, um mannagongdir og møguligar komplikatiónir í sambandi við eina fosturtøku. Teirra vitan er við til at tryggja, at avgerðartilgongdin er grundað á viðkomandi læknafrøðiligan neyvleika. Ásett er, at serkøn hjá Føroya Kærustovni eru ein serlækni í kvinnusjúkum ella ein barnalækni. Við at hava møguleikan fyri, at hava ein barnalækna sum serkønan, verður hædd í ávísan mun tikin fyri støðum, har serlæknin í kvinnusjúkum er ógegnigur.

Landssjúkrahúsið ivast í, um ein barnalækni skal vera serkønur hjá Føroya Kærustovni í mun til fosturtøkumál. Víst verður á, at ein barnalæknin stórt sæð ongar royndir hevur í tílíkum málum og møtir stórt sæð ongantíð einari kvinnu, sum ynskir fosturtøku. Um man metir serfrøðina hjá barnalæknanum verða týdningarmikla, t.d. í mun til um fostrið ber brek, so kann barnalæknin hoyrast í málinum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað kann gerast trupult at finna ein óheftan serlækna í kvinnusjúkum afturat, sum skal vera serkønur hjá Føroya Kærustovni. Tí verður mett, at tørvur er á einum alternativi. Løgmálaráðið hevur fingið upplýst er, at ein barnalækni hevur eins og ein serlækni í kvinnusjúku góðar førleikar til at meta um, hvørt treytirnar fyri fosturtøku eru loknar ella ikki.

1.12. Til § 18 *Revsiásetingar*

Amnesty mælt til, at heilsustarvsfólk ella onnur, ið hjálpa til við at fremja fosturtøku, ikki verða revsað.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at fosturtøka bara kann verða framd eftir 12. viku undir nærri ásettum treytum. Endamálið við revsiásetingunum er at forða fyri, at ein fosturtøka verður framd, uttan at lógarásettu treytirnar eru loknar. Út frá hesum sjónarmiðinum verður hildið fast við, at tann, sum fremur fosturtøku ella hjálpir við at fremja fosturtøk uttan, at lógarásettu treytirnar eru loknar, kann revsast fyri tað.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at revsiábyrgd fyri kvinnuna ikki er ásett.

Heilsutrygd og Gigni spyrja, hvør munur er á at taka annans barnsburð og fosturtøka.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at eingin munur er á hesum hugtøku. Fyri at nýta somu orðingar í lógartekstinum verður orðingin *at taka annans barnsburð* broytt til *fosturtøku.*

2. Aðrar viðmerkingar

2.1. Lógaruppskotið líkist donsku lógini

Pro Vita, MEGD og Etiska ráðið undrast á, at lógaruppskotið líkist galdandi donsku lógini frá 1973, tá ið høvuðsgrundgevingin fyri at broyta galdandi lóg er, at hon er ov gomul, og hví man ikki heldur ger lógarsmíð til føroysk viðurskifti, sum eisini var ein grundgeving fyri at broyta galdandi lóg. Víst verður á, at útgangsstøði eigur at verða tikið í føroyskum viðurskiftum.

Løgmálaráðið hevur havt eina røð av fundum við áhugabólkar, felagsskapir og onnur, ið kunnu metast at hava týðandi vitan ella áhuga í arbeiðinum við at endurskoða fosturtøkulógina. Lógaruppskotið er eitt úrslit av hesum arbeiðinum, og uppskotið avmyndar í ávísa mun verandi siðvenju á økinum. Víst verður á, at eitt av endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi lóg um fosturtøku, soleiðis at hon verður meira nútíðarhóskandi og avmyndar verandi siðvenju á økinum.

2.2. Endamálsorðing

Megd mælir til, at endamálið við lógini verður staðfest í sjálvum lógartekstinum, og at endamálorðingin verður tillagað og útgreinað betri, hvussu lógin skal røkka teimum endamálum, ið hon setur.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at endamálsásetingar, ið ikki staðfesta ávís rættindi ella skyldur, men einans greiða frá tí yvirskipaða endamálinum við løgtingslógini, eiga ikki at verða skrivaðar inn í sjálva lógina. Endamálsorðingar eiga heldur at verða skrivaðar og lýstar í teimum vanligu viðmerkingunum í kapittul 1 til lógaruppskotið.

2.3. Nær lívið byrjar

Pro Vita metir, at tað lívfrøðiliga er púra greitt, at lívið byrjar við gitnaði, og at viðmerkingin í lógaruppskotinum um, at tað læknafakliga einki endaligt úrslit er um, nær lívið byrjar, er misvísandi

Mammuhjálpin tekur ikki undir við uppskotinum og vísir á, at lógaruppskotið ger mismun á børnum í móðurlívi og frátekur teimum rættin til lív. Mammuhjálpin metir, at rætturin til lívið byrjar við gitnaði.

Etiska ráðið vísir á, at nakrir ráðslimir seta spurnatekin við útsøgnina um, at tað læknafakliga einki endaligt úrslit er um, nær lívið byrjar, um metingin av, hvørt eitt barn er lívført ella ikki, kann grunda, um fosturtøka skal verða framd ella ikki. Ráðið átalar, at so lítið sæst til veruligar etiskar ósemjur í lógaruppskotinum, og at tað ikki verður greitt frá, hví hesar ósemjur ikki verða viðurkendar.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at í uppskotinum verður støða ikki tikin til, nær lívið byrjar, men at tað bara verður staðfest, at eingin endalig niðurstøða er um hetta. Útsøgnin um, at tað læknaliga eingin endalig niðurstøða er um hetta verður broytt til, at ein endalig niðurstøða er um hetta.

Løgmálaráðið skal somuleiðis viðmerkja, at Løgmálaráðið hevur havt eina røð av fundum við áhugabólkar, felagsskapir og onnur, ið kunnu metast at hava týðandi vitan ella áhuga í

arbeiðinum við at endurskoða fosturtøkulógina. Lógaruppskotið er eitt úrslit av hesum arbeiðinum og politiskum ynskjum. Endamálið við uppskotinum er ikki at viðgera stóru etisku spurningarnar í einum slíkum lógaruppskoti, og tí fegnast Løgmálaráðið um viðmerkingarnar frá Etiska ráðnum, har fleiri av hesum spurningunum eru viðgjørdir nærri.

2.4. Fosturtøkutalið

Mammuhjálpin metir, at lógaruppskotið sannlíkt fer at føra til eina øking í fosturtøkutalinum í Føroyum – møguliga eina fleirfalding. Víst verður m.a. á, at fosturtøkutíttleikin er munandi hægri í Danmark samanborið við Føroyum. Ítøkiliga vóru tað í 2022 framdar 249 fosturtøkur í Danmark pr. 1.000 livandi fødd børn, meðan hetta talið var 43 í Føroyum.

Pro Vita vísir á, at í tíðarskeiðnum frá 1994 til 2022 var talið á fosturtøkum 1085. Hetta hevur samfelagsligar avleiðingar í dag, og fyriliggjandi lógaruppskot fer ikki at bøta um trupulleikan. Fleiri dømi vísa greitt, at frí fosturtøka, hækkar um fosturtøkutalið og lækkar um burðartalið, og hetta er ikki til gangs fyri okkum, hvørki sum tjóð ella sum einstaklingar.

Løgmálaráðið ásannar, at talið á fosturtøkum í fyrstu atløgu helst fer eitt vet upp eftir, av tí at skuggatølini koma at verða ein partur av almennu hagtølunum. Soleiðis sum gongdin hevur verið seinastu nógvu árini, verður tó væntað, at talið á fosturtøkum stillar seg aftur.

Løgmálaráðið skal somuleiðis vísa á, at uppskotið í ávísan mun avmyndar verandi siðvenju á økinum, og tí verður mett, at fosturtøkutalið í fyrstu atløgu fer at hækka, av tí at skuggatølini koma at verða ein partur av almennu hagtølunum. Soleiðis sum gongdin hevur verið seinastu nógvu árini, verður tó væntað at talið á fosturtøkum stillar seg aftur.

2.5. Fosturtøka av sonevndum eugeniskum orsøkum

Pro Vita vísir á, at eugenetik er moralst sera eldfimt, og frástøða eigur at vera tikið frá einum hugburði um rasureinsan, tí hóast tað lívfrøðiliga kann ljóða sum eitt gott hugskot, so er tað menniskjaliga púra burturvið og eigur ikki at vera partur av lógaruppskotinum.

Frítt Val og Etiska ráðið mælir til, at orðið eugenikkur verður strikað.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at loyvi til fosturtøku verður givið út frá einari ítøkiligari meting hjá einstøku kvinnuni og einstaka fostrinum og ikki út frá samfelagsligum orsøkum. Hugtakið "eugenikkur" verður strikað.

2.6. Sterilisatión

Landssjúkrahúsið og Suðuroyar Sjúkrahús vísir á høvi til at gera broytingar í aðrari viðkomandi lóggávu. Viðmerkingarnar snúgva seg tí í høvuðsheitum um lóg um sterilisatión og kastratión, sum verður mett at vera ótíðarhóskandi.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at í uppskotinum er víst á møguleikan fyri at broyta sterilisatiónslógina sum ein møguleika fyri at forða fyri, at ein kvinna kemur í eina støðu, har hon verður við barn uttan at ætla tað, og tí fer at umhugsa fosturtøku. Hetta uppskotið snýr seg um fosturtøku, og tí eru reglur um sterilisatión og kastratión ikki ein partur av sjálvum uppskotinum.

2.7. Atlitið at heilsustarvsfólki, sum skulu fremja fosturtøku

Pro Vita metir, at lógaruppskotið setir heilsustarvsfólk í eina óhepna støðu. Fólk, sum síggja fosturtøku, sum at taka eitt lív, vera tvungin til at halda eina lóg, sum tey ikki taka undir við, um tey ynskja at arbeiða á t.d. økinum fyri kvinnusjúkur.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at sambært uppskotinum hevur lækni, sum fær eina umsókn um fosturtøku skyldu til at kunna og vegleiða kvinnuna um møguleikan fyri at fáa ráðgeving og stuðulssamrøðu. Einki stendur í lógaruppskotinum um, at ein lækni hevur skyldu til at fremja eina fosturtøku. Sjúkrahúsverkið skal tó tryggja, at ein fosturtøka verður framd, um kvinnan ynskir tað, og treytirnar sambært lógini eru loknar.

2.8. Tvørgangandi sáttmálar

Javni ger vart við, at Føroyar hava tikið undir við sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi einstaklinga, ið bera brek, har ásett er, at limalondini vátta, at eitt og hvørt menniskja hevur natúrligan rætt til lív og vilja taka øll neyðug stig til at tryggja, at fólk, ið bera brek, fáa notið henda rætt til fulnar á jøvnum føti við onnur.

Megd vísir á, at altjóða brekrættindasáttmálin, altjóða barnarættindasáttmálin og evropeiski mannarættindasáttmáli eru viðkomandi millumtjóða sáttmálar.

Løgmálaráðið tekur undir við, at nevndu sáttmálar eru viðkomandi fyri uppskotið. Sáttmálarnir verða umrøddir í uppskotinum.

2.9. Innflutningur av fosturtøku heilivági og ótryggar fosturtøkur

Mammuhjálpin vísir á, at uppáhaldið um, at kvinnur fara at fremja lívshættisligar og ótryggar fosturtøkur er ógrundað.

Etiska ráðið vísir á, at eingin staðfesting er av, hvussu vanligt tað er, at kvinnur sjálvar taka fosturtøku heilivág, hvar vitanin um, at hetta kemur fyri í Føroyum, kemur frá, ella nøkur staðfesting av, at hetta er nakað, ein hevur sæð neiligar avleiðingar av í heilsuverkinum í Føroyum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at fleiri av teimum, sum hava verið á fundi í Løgmálaráðnum hava víst á, at dømir eru um, at kvinnur innflyta og taka fosturtøku heilivág uttan vegleiðing frá lækna. Løgmálaráðið hevur somuleiðis fingið upplýst, at hetta kann hava álvarsligar fylgjur við sær og kann í ringasta føri vera lívshættisligt. Hetta sama ger seg galdandi við fosturtøkuferðavinnu, har mann er vitandi um, at kvinnur fara uttanlands fyri at fáa fosturtøku, tó uttan at almenn hagtøl eru fyri herum. Hóast eingin staðfesting er av, hvussu vanligt hetta er, kann Løgmálaráðið ikki avvísa, at hetta fer fram, og at hetta er ein avleiðing av galdandi lóg. Tí verður eisini mett neyðugt at taka hetta við í lógaruppskotið.

Løgmálaráðið skal viðmerkja fosturtøkur hava verið og fara at verða framdar, eisini um fosturtøka er bannað við lóg ella bara loyvd undir nærri ásettum treytum. Er fosturtøka bannað við lóg, ella bara loyvd undir ávísum umstøðum, finna kvinnur aðrar loysnir. At nokta kvinnum fosturtøku hevur sostatt ikki við sær, at fosturtøkur ikki verða framdar. Løgmálaráðið metir, at uppskotið kann vera við til at forða fyri, at kvinnur fáa ólógligar og ótryggar fosturtøkur uttan vegleiðing frá lækna ella leita sær til onnur lond, har tað er loyvt. Ólógligar fosturtøkur kunnu

vera lívshættisligar, og at fara uttanlands at fáa fosturtøku er bæði kostnaðarmikið, seinkar tilgongdina og økir um sosialan ójavna.

2.10. Javnstøða

Almanna- og mentamálaráðið tekur undir við uppskotinum, sum eisini er í tráð við hugsjónina um kvinnurættindi í javnstøðuhøpi.